

# Tónleikagudstænasta í Sandavágs kirkju

Pálmasunnudag kl 18. verður gudstænasta, har Vágakórið saman við Gudmundi Mortensen, organisti og kórleiðara, fara at taka lut. Har verður kórsangur, orgultónleikur og felagssálmasongur. Lisið verður úr Halgubók. Skráin er soleiðis, at tónleikur og lestrar hóska til hvønn dag í páskavikuni: pálmasunnudag, skírishósdag, langafríggjadag, páskadag og annan páskadag. Kórið syngur kórsatsir við orðum úr Sálmunum í Gamla Testamenti og sálmum úr Sálmabókini. Merete Kuhlman, organistur, hevur skrivað nakrar av hesum satsum. Hon dugir sera væl við einfaldum tónalagi og urgufylgispæli at fáa innihald og tónar í teimum ymsu páskadøgunum fram. Gudstænastan er ætlað sum fyrireiking til páskahátíðina.




*Tað var ein sera ovfarin stjóri á Havstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, sum í gjár tók ímóti eini tilsøgn upp á heilar 10 miljónir krónur til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

inni í Magnus Heinasonarfjørði í Grønlandi. Vit byrjaðu at fiska ein leygardag, og umráðandi var, at vit fingu onkran fisk, áðrenn sunnudagurin kom. Men vit drógu svart hendan dagin.

Hann segði, at teir síðan løgdu seg í Skjoldungen, har Pollur, sum var leigaður til royndir, lá uppankraður og helt sunnudag.

- Vit bundu fast í Poll, og hetta var fyrstu ferð, at eg hoyrdi navnið Jákup Sverri Joensen nevnt. Hann var nevniliga við Polli.

Viberg segði, at tá Pollur dró akker og fór sín veg, lá línuskipið, hann var við, og dreiv á fjørðinum.

- Vit høvdu snellur í skipinum, men høvdu ikki loyvi at kasta. Men so koyrdi ein dorgina út, og hon var full av fiski... og so var "kampurin í gongd", sum hann tók til.

Hetta var hin 29. august í 1961.

Viberg mintist eisini fyrstu ferð, hann hoyrdi navnið á Hjalta í Jákupsstovu nevnt.

- Vit vóru norðanfyri Føroyar, har vit partrolaðu saman við Kapilsund fyri Fiskirannsóknarstovuna. Teir sendu Jens Chr. Svabo norður at hjálpa okkum at finna fisk, men tað gekk ikki væl. Meðan vit eru norðanfyri, kemur rannsóknarskipið Johan Hjort til okkara.

Hann segði, at tá spurt varð, um nakar føroyingur var við skipinum, var svarið:

- Vi har en flot ungkarl fra Færøerne ombord, Hjalti í Jákupsstovu.

Viberg mintist eisini, tá hann fyrstu ferð hoyrdi um Rógva K. Mouritsen, sum eisini er vorðin kendur í havrannsóknarumhvørvi.

- Hann kom við okkum suður á Bill Baily. Hetta var síðst í november, og veðrið var vánaligt. Tá vit komu aftur í havn, tók Rógvi klædnasekkin, fór niðan eftir bryggjuni, og vit sóu hann ongantíð aftur, segði Viberg Sørensen brosandi.

## Messuprát

Eins og Viberg segði, at fiskifrøði ikki altíð hevur havt so gott orð á sær í messupráti umborð á skipi, hevði Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, sum var næstur at taka orðið, eisini eina slíka søgu at siga.

Jan segði, at soleiðis, sum hann hevði skilt gomlu tíðina, tá fiskifrøðiligi stovnurin varð skipaður fyri mongum árum síðan, vóru eisini fiskimenn glaðir fyri henda stovn og spentir eftir at frætta um tær metingar, sum stovnurin kom eftir.

- Men sum frá leið, og tá línureiðskapurin gjørdist betri við eitt nú sissal línu og svøvlalínu, fór stevið millum fiskifrøði og fiskimenn at dragna.

Jan vísti á, at fiskifrøðin ikki altíð hevur fingið besta ummæli í messupráti, og hann helt, at samstarvið millum fiskimenn og fiskifrøði ikki er nóg gott.

- Vit mugu arbeiða meira saman, helt formaðurin í Fiskimannafelagnum fyri.

Hann vísti á, at vitanin um fiskifrøðiligu gongdina ikki er nóg stór, ei heldur forstáilsi millum fiskimenn og fiskifrøði.

- Fiskur kennur ikki mørk. Tað nyttar einki at friða leiðir, sum best ber til, tí botnviðurskiftini eru so ymisk og kunnu hava alstóran týdning. Í onkrum londum hava teir friða við bara at seta nakrar strikur í kortið, men tað dugir ikki.

Jan Højgaard nam eisini við eina stuttliga søgu.

- Eg var við línuskipinum Mascot, tá kokkurin umborð, Sigmund Djurhuus, sum er ein óførur kokkur, hevði fingið kjans við havrannsóknarskipinum, Magnusi Heinasyni. Hetta var ikki serliga væl dámt millum menninar umborð – tað, at maðurin nú fór við havrannsóknarskipi, segði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, sum við endan av síni røðu handaði Havstovuni eina gávu.

## Stór heiðursgáva

Undan móttøkuni hevði okkurt graml gingið um, at Fiskirannsóknarstovan fór at fáa handaða eina stóra peningagávu til nýtt havrannsóknarskip, og tí var spenningurin stórur, tá Jákup Sólstein, fyrrverandi formaður í Føroya Reiðarafelag, steig fram.

Jákup byrjaði við at siga, at Reiðarafelagið í hansara tíð hevur havt eitt sera gott samstarv við Fiskirannsóknarstovuna, tó at partarnir ikki altíð hava verið samdir um fiskifrøðilig útlit.

Fyrrverandi reiðarafelagsformaðurin hevði eisini onkra søgu at siga, hvussu hann sum skrivstovumaður hjá Kjølbro í sekstiárunum skuldi skriva vektarseðlar og senda teir til Jákup Sverra Joensen.

Jákup Sólstein helt fyri, at týdningurin av Fiskirannsóknarstovuni ikki minst hevur verið stórur, tá samráðast skuldi um fiskirættindaavtalur landanna millum.

- Tá aðrir møta til slíkar fundir, hava teir sínar ráðgevar við, og tað hevur verið ein stór hjálp hjá okkum í slíkum samráðingum, at vit hava havt okkara ráðgevarar við til at undirbyggja okkara krøv.

Hann helt fyri, at Føroyum hevur eydnast at fáa rímiliga væl burtur úr í samráðingum við onnur long, og hetta er ikki minst stovninum í Nóatúni fyri at takka.

At enda í síni røðu avdúkaði Jákup Sólstein stóru peningagávuna, sum Forskotsgrunnur Fiskiflotans hevur samtykt at játta til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi – nevniliga 10 miljónir krónur!

Eftir fráboðanina um hesa tilsøgn, segði stjórin á Havstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, seg nærmast vera málleysan og helt fyri, at gávan er eitt stórt "trúarsignal" frá einari samlaðari føroyskari vinnu, sum hann tók til.

Eftir hetta høvdu eisini onnur orðið, og millum røðarar, ið nýttu høvi at heilsa Havstovuni á hátíðardegnum, var Tórbjørn Jacobsen, fyrrverandi fiskimálaráðharri, ið var maðurin, sum setti út í kortið við nýggjum havrannsóknarskipi.




*Tilsøgnin hjá nevndini fyri Forskotsgrunni Fiskiflotans til bygging av nýggjum havrannsóknarskipi er treytað av, at løgtingið samtykkir broytingar í lógini fyri grunnin – og at verkætlanin verður veruleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*